ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.



## Húsini Áarvegur 5, Tórshavn

Grundøkið, matr. nr. 475, er 155 m² til víddar. Húsini eru í trimum hæddum, hvør uml. 120 m² Í niðastu hæddini eru stór handilshøli, og í ovaru hæddunum eru 2 íbúðir.

Húsini krevja ábøtur, men liggja sera væl fyri í miðbýnum, bæði til bústaðar- og vinnuligt endamál.

## Grundøkið, matr. nr. 550, Tórshavn

Grundøkið við Krókábrekku er 105 m² við ástandandi úthúsi.

## Matr. nr. 116 a, Haldórsvík

4 lutir innangarðs, til støddar tilsamans 832 m².

Ognirnar verða seldar, um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til undirritaðu. Sí eisini heimasíðu okkara.

**Advokatskrivstovan**
Tel. 353335
att: Fríða Patursson, adv.
frp@jura.fo ella
skrivaran Anniku
Reginsdóttir Olsen,
aro@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6
FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX 35 33 36
WWW.JURA.FO

Skipaeftirlitið
Faroese Maritime Authority

# Skipaeftirlitsfólk til manningardeildina

Av tí at eitt av okkara starvsfólkum hevur valt at royna nýggjar leiðir verður søkt eftir eftirlitsfólki til manningardeildina. Uppgávurnar á manningardeildini fevna m.a. um manningarásetan til fiskiskip og handilsskip, útvegan av vinnubrøvum og yvirornað mynstringareftirlit.

**Um starvið**
Starvið inniber í høvuðsheitum hesar uppgávur:

Umsiting og málsviðgerð av løggávu, ið knýtir seg at manningarviðurskiftum, undir hesum:

- at fyrireika manningarskjøl til fiskiskip, farmaskip og ferðamannaskip
- at hava umsjón við mynstringum og viðurskiftum, sum knýta seg at mynstring
- málsviðgerð av vinnubrøvum, undir hesum málsviðgerð av vinnubrøvum hjá útlendskum sjómonnum, sum sigla við føroyskum skipum
- luttaka í fyrireikingararbeiði til lógarsmíð
- at hava eftirlit og umsita viðurskiftini, sum eru staðfest í STCW konventiónini og ILO konventiónum, ið knýta seg at manningarviðurskiftum á skipum
- samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

Miðað verður eftir, at tann ið settur verður sum frá líður yvirtekur ábyrgdina av dygdarmenningarskipanini hjá stovninum, sum er ein ISO 9001 góðkend skipan.

**Útbúgvingar- og førleikakrøv**
Til starvið krevst

- ein av niðanfyri nevndu útbúgvingum:
  1. maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri, STCW III/2
  2. skipsførari við sjóvinnubrævi sum skipsførari, STCW II/2
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Ynskiligt er, at umsøkjari hevur kunnleika til dygdarmenning, herundir ISM og ISO 9001 skipanir.

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaður er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Vinnumálaráðnum. Starvið verður sett sum skjótast.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 18. januar 2010 kl. 15.00.

Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Sigfrid Petersen, samskipara, ella til Vilhjálm Gregoriussen, stjóra.

Umsóknir skulu sendast sum bræv ella teldubræv til: Skipaeftirlitið, postsmoga 26, FO-370 Miðvágur

**Skipaeftirlitið**
Postsmoga 26 · 370 Miðvágur · Telefon 35 56 00
Telefax 35 56 01 · E-mail: fma@fma.fo

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

**Søgu- og samfelagsdeildin bjóðar í vár út tvey støk masterskeið í løgfrøði, ið eftir umsókn kunnu gerast partur av masterútbúgving.**

## Stakskeiðið í løgfrøði – Føroysk fyrisitingarlóg

Stakskeiðið í løgfrøði ber heitið "Føroysk fyrisitingarlóg" og telur 10 námsstig á masterstøði, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í løg.

Undirvísingin byrjar 5. februar 2010. Skrivlig próvtøka verður 20. apríl 2010.

Lærari verður Kári á Rógvi, PhD, lektari. Eisini verða gestafyrilesarar.

Endamálið er at veita innlit í føroyska fyrisitingarlóg – serliga í tey mongu sløgini av rættarkeldum – tinglógir, dómalóg, venju hjá umboðsmansstovni, kærunevndum og øðrum stovnum. Út frá dømum um praktiskar avbjóðingar í føroyskari fyrisiting verða tey lesandi kunnaði um mótið millum evniligar, tøkniligar spurningar og so fyrisitingarligar spurningar. Dentur verður lagdur á háttalag at meta um rættarstøðuna.

Í praktiskari fyrisiting á almennum stovnum vera stór krøv sett fyrisitarum, bæði løgkønum og fólki við aðrari útbúgving. Karmar eru settir í løg, men innan hesar karmar skulu fyrisetarar leggja virki sítt til rættis, ráðgeva ovastu leiðsluni um møguleikar og avleiðingar. Hetta kann bæði vera avbjóðandi og spennandi, men setir eisini krøv um at gera vart við seg, tá ið ætlan er at taka óheimilaði stig. Oftast er neyðugt bæði at hava serkunnleika á ávísum fyristingarligum ella tøkniligum øki umframt duga at brúka fyrisitingarligar meginreglur. Skeiðið skal tí geva teimum lesandi kunnleika og amboð at greina tær ymsu skyldur og reglur, ið hvíla á fyrisitingin. Tey lesandi verða fyrireikaði til ráðgevandi leiklutin í almennari fyrisiting. Undirvísingin verður skipað við framløgum frá lærara og gestafyrilesarum. Eisini verða studentaframløgur.

Próvtøkuformur: Skrivlig avrik telja 1/3 av próvtalinum, skrivlig próvtøka 2/3. Uttansetturs próvdøming.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi við nóg mikið av løgfrøði ella javnmettum fakum eitt nú grundskeiði í løg.

## Stakskeiðið í løgfrøði – Mannarættindi og revsirættur í Føroyum

Stakskeiðið í løgfrøði ber heitið »Mannarættindi og revsirættur í Føroyum« og telur 10 námsstig á masterstøði, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í løg.

Undirvísingin byrjar 9. apríl 2010. Munnlig próvtøka verður 21. og 22. juni 2010.

Lærari verður Kári á Rógvi, PhD, lektari. Eisini verða gestafyrilesarar.

Endamálið við skeiðnum er at veita innlit í týdning fyri og ávirkan á revsirætt av mannarættindum, serliga Europeiska Mannarættindasáttmálanum. Tey lesandi skulu fáa nøktandi innlit í revsing og mannarættindi til tess at kunnu eyðmerkja og greina trætur, har hesar rættarreglur fáa týdning í senn og tí bæði møtast og skulu avvigast.

Skeiðið kannar bæði almennar og serstakar spurningar á mótinum millum revsirætt og mannarættindi. Meginreglur sum legalitetsprinsippið í § 1 í verandi donsk-føroysku revsilóg og forboðið móti afturvirki í grein 7 í EMRS verða viðgjørd. Harumframt verður hugt at tulkingarstíli og venju hjá bæði norðurlendskum dómstólum og Europeiska Mannarættindadómstólinum. Evni sum framsøgufrælsi og trúarfrælsi í samvirkan við revsirætt eru somuleiðis sera týðandi. Skeiðið er serliga viðkomandi, nú ætlanir eru at yvirtaka revsirætt sum føroyskt sermál.

Undirvísingin verður skipað við framløgum frá lærara og gestafyrilestrarhaldarum – ætlandi dómarum og lærdum úr grannalondum og Føroyum. Eisini verða studentaframløgur.

Próvtøkuformur: Skrivlig avrik telja 1/3 av próvtalinum, munnlig próvtøka 2/3. Uttansetturs próvdøming

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi við nóg mikið av løgfrøði ella javnmettum fakum eitt nú grundskeiði í løg.

**Skeiðini eru nógv eftirspurd og kosta 5.500,00 kr. hvørt. Lesandi innskrivað við Fróðskaparsetur Føroya ella við annan hægri lærustovn fáa tó skeiðini ókeypis. Umsóknarblað fæst við at venda sær til Søgu- og samfelagsdeildina, J. Broncks gøta 25, 4.h., Tórshavn, tlf. 352580. Víst verður eisini til heimasíðuna: www.setur.fo Avmarkað luttøka. Umsóknarfreistin er sett til týsdagin 19. januar 2010. Tikið verður tó upp, til skeiðini eru fullsett.**

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
**Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14**
**Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo**